# Handverkarasáttmálin

Marius Thomassen, ráðgevi

19. okt. 2022

# Skrá

- Høvuðssáttmálin
- Lønin
- Starvsaldur
- Onnur viðurskifti
- Fastlønarsáttmálin
- Lærlingar
- Protokolat

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Lønin

Lønin hækkar soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. oktober 2022: | 3,80 % |
| 1. oktober 2023: | 4,04 % |

# Starvsaldur

*“Eftir 2 ára starvstíð verður viðbótin 2,50% av grundlønini*

*Eftir 4 ára starvstíð verður viðbótin 3,50% av grundlønini*

*Eftir 6 ára starvstíð verður viðbótin 4,00 % av grundlønini*

*Eftir 8 ára starvstíð verður viðbótin 5,00% av grundlønini*

*Eftir 10 ára starvstíð verður viðbótin 6,50% av grundlønini*

*Eftir 11 ára starvstíð verður viðbótin 8,00% av grundlønini”*

Hendan orðing verður strikað:

~~*“Eftir 3 ára starvstíð verður viðbótin 2,5% av grundlønini. Eftir hetta* ***avtala*** *arbeiðsgevari og handverkari viðbótarhækkingar* ***sínamillum*** *við hóskandi millumbili. Í setanarpróvnum verður nágreinað, nær starvsaldursviðbótin skal endurskoðast.”*~~

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Starvsaldur - víðari

Ikki krav, at arbeiðsgevarar hækka lønina við starvsaldurviðbótini, um so er at handverkari longu fær eina viðbót sum er ájavnt ella hægri enn nýggja starvsaldurviðbótin.

Tað vil siga, at fær handverkari persónliga viðbót, og hon er omanfyri ta starvsaldursviðbótina, sum handverkarin hevur rætt til við nýggju semjuni, so hevur arbeiðsgevarin ikki skyldu til at hækka lønina við broyttu starvsaldurviðbótini.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Skaðar og uppsøgn

Í grein 3 verður orðingin: *”og handverkarafeløgini við hini helvtini”* í stk. 1, strikað, so at meistarin ella virkið rindar munin. Stk. 1 kemur sostatt at ljóða soleiðis:

> *“Stk. 1. Kemur handverkari til skaða í arbeiðstíðini, skal meistarin ella virkið í upp til 10 dagar, gjalda honum munin ímillum vanliga vikuløn og tað, sum goldið verður frá dagpeningaskipanini.”*

Í §3, stk. 3 verða ”*9 mánaðir*” broyttir til ”*6 mánaðir*”.

Í § 3, stk. 3, verða ”*5 mánaðir*” broyttir til ”*6 mánaðir*”.

Í §4, stk. 5 verða ”*9 mánaðir*” broyttir til ”*6 mánaðir*”.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Skaðar

Í §3, stk. 3 verða ”*9 mánaðir*” broyttir til ”*6 mánaðir*”.

Stk. 3. Verður handverkari, sum hevur arbeitt hjá sama meistara í meira enn **6** mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsakað av einum arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini, hevur arbeiðsgevari, aftaná at tíðarskeiðið í stk. 1 er endað, skyldu at rinda munin millum dagpeningaveitingina og vanligu lønina, sum handverkari hevði fingið útgoldna, um viðkomandi ikki fekk skaðan.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Skaðar

Í § 3, stk. 3, verða ”*5 mánaðir*” broyttir til ”*6 mánaðir*”.

Gjaldskyldan hjá meistara stendur við inntil handverkari aftur er arbeiðsførur tó í mesta lagi **6** mánaðir aftaná, at arbeiðsskaðin er hendur.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Uppsøgn

Í §4, stk. 5 verða ”*9 mánaðir*” broyttir til ”*6 mánaðir*”.

Stk. 5. Verður handverkari, sum hevur arbeitt hjá sama meistara í meira enn **6** mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsaka av einum arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini, kann viðkomandi ikki sigast úr starvi fyrr enn 7 mánaðir, aftaná arbeiðsskaðin er hendur. Hetta er tó bert galdandi, inntil handverkari aftur er arbeiðsførur.

# Sætta frívika

1. Í grein 9 verður sett inn nýtt stk. 3:

   *”Umframt frídagarnar í stk. 1 hevur løntakari rætt til 5 frídagar uttan løn. Arbeiðsgevarin ásetir í samráð við løntakaran, nær hesir frídagar skulu takast.”*

# Staðfesting í álitismannaskipanini

Í punkti 1 í álitismannaskipanini verður sett inn sum seinasta petti:

*”Álitisfólk skal vera limur í handverkarafelag”.*

# Tilkalsvakt

Í § 23 um tilkallivakt verða prosentini broytt til ávikavist 14% og 28%.

# Fastlønarsáttmálin.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Fastlønarsáttmálin – Nýggjársaftan fastur frídagur

- Í grein 6 í fastlønarsáttmálanum verður “*nýggjársaftan*” lagt afturat orðingini í fyrsta petti.

# Fastlønarsáttmálin – 6. frívika

- *"Handverkari hevur rætt til at keypa sær 5 frídagar um árið. Kostnaðurin av hvørjum frídegi er* ***0,45%*** *av árslønini hjá handverkaranum. Handverkari, ið verður settur í starv eftir ársbyrjan, vinnur sær rætt til at keypa frídagar lutfalsliga í mun til nær á árinum, hann verður settur í starv. Arbeiðsgevarin ásetir í samráð við handverkaran, nær hesir frídagar skulu takast."*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Fastlønarsáttmálin – Uppsøgn

Í grein 11 um uppsøgn í fastlønarsáttmálanum verður nýtt trin lagt inn **frá 6 mánaðum til 2 ár við 2. mánaðar uppsagnarfreist**, soleiðis at uppsagnarreglurnar í stk. 1 verða orðaðar soleiðis:

> *”Stk. 1. Starvsavtala kann sigast upp til uppathald við einum mánaða freist til tann fyrsta í einum mánaða, uttan so at avtala er, at arbeiðið er bert fyribils ella sum roynd, og at hesi arbeiðsviðurskifti vara ikki longur enn 3 mánaðir.*
>
> ***Eftir 6 mánaðar starvstíð kann starvsavtala sigast upp við 2 mánaða freist.***
>
> *Eftir 2 ára starvstíð kann starvsavtala sigast upp við 3 mánaða freist.*
>
> *Eftir 5 ára starvstíð kann starvsavtala sigast upp við 4 mánaða freist.*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Fastlønarsáttmálin – Protokollat um frálandavinnu strikað.

Orðingin um protokollat um sáttmála um frálandavinnu verður strikað:

> *"Protokollat um sáttmála um frálandavinnu:*
>
> *Partarnir eru samdir um at taka upp samráðingar um ein sáttmála fyri handverkarar, sum arbeiða í frálandavinnu á føroyska landgrunninum.*
>
> *Miðað verður ímóti, at hetta arbeiði er liðugt 1. juni 2015."*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Lærlingar

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Lærlingar

Grein 4 verður broytt til at ljóða soleiðis:

*"Víst verður til løgtingslóg um Frítíð við løn. Lærlingurin fær frítíðarløn, p.t. 12%,* ***eisini av yvirtíð****."*

# Lærlingar

Í grein 9 verður sett inn nýtt stk. 2, sum ljóðar soleiðis:

*”Um lærlingurin verður biðin at møta til arbeiðis í skúlaskeiðnum, skal hann lønast sambært grein 13 um yvirtíð. Um lærlingurin hevur fingið góðskrivað lærugreinar, fær lærlingurin serarbeiðaraløn fyri tíðina, lærlingurin verður kallaður inn teir tímarnar, har lærlingurin er frítikin fyri skúlagongd.”*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Gildi

Í grein 37 verða hesar broytingar gjørdar:

*”Stk. 1. Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2022 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við 2 mánaða freist, til ein 1. mai, tó í fyrsta lagi til 1. mai 2025.”*

- Fyri fastlønar- og lærlingasáttmálin kemur í gildið:

*“Gildiskoma og uppsøgn fylgir høvuðssáttmálanum.”*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Gildi - víðari

**Yvirlit yvir samráðingarunduna hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Ár 1**

| | |
|---|---|
| 1. mai | FAG og arbeiðarafeløgini - nýggj samráðingarrunda byrjar |
| 1. juni | FAG og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar á landi |
| ~~1. okt.~~ | ~~FAG/FHMF og FHF/LH~~ |
| 1. okt. | FAG/FHMF og Atl. Workers Union |
| 1. nov. | FAG og Súlan |
| 1. jan. | FAG og Starvsfelagið, Føroya Tele |
| 1. jan. | FAG og Starvsfelagið, Post |
| 1. jan. | FAG og Starvsfelagið, Vága Floghavn |
| 1. mars | RFH og manningarfeløgini |

**Ár 2:**

| | |
|---|---|
| **1. mai** | **FAG/FHMF og FHF/LH** |
| 2. mai | FAG og Finansforbundet |
| 1. mai | FAG og YTF |
| 1. mai | FAG og Samverk |
| 1. mai | FAG/FP og Grafiska Yrkisfelagið |
| 1. juni | FAG og YTF, Elektron |
| 1. nov. | FAG og Føroysk Miðlafólk |
| 1. apríl | FAG og Flogskiparafelag Føroya |

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Protokolat um matstovur og gistingarhús, og um lagaligari arbeiðstíðir

*“Partarnir eru samdir um at arbeiða víðari við uppskoti til sersáttmála fyri arbeiði á matstovum og gistingarhúsum á sáttmálaøkinum hjá handverkarafeløgunum.*

*Arbeiðið skal verða komið á mál og uppskot lagt fram fyri feløgunum 31. desember 2022. Partarnir binda seg til at halda í minsta lagi tríggjar samráðingarfundir, áðrenn árið er úti.*

*Tá sersáttmáli er undirskrivaður fara partarnir undir at viðgera spurningin um liðiligar arbeiðstíðir.”*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Spurningar?

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY